# Postverkið og Strandferðlslan skulu samansjóðast

*Fyri at sleppa undan dupultfunktiónum skal nú arbeiðast fyri at leggja saman parar av virkseminum hjá Strandferðsluni og Postverkinum*

John Johannessen

Postverkið verður ein sjálvstøðug almenn fyritøka trý tey næstu árini. Men fyri at sleppa undan dupultfunktiónum skulu partar av virkseminum hjá Strandferðsluni og Posverkinum samansjóðast. Harafturat fer landsstýrismaðurin í Vinnumálum at biðja løgtingið um heimild at veita Postverkinum eina eykajáttan á 10 milliónir krónur, so virksemið ikki steðgar upp.

Hetta var úrslitið av landsstýrisfundinum í gjár, har støðan hjá Postverkið Føroya stóð ovast á fundarskránni.

Fyri góðari viku síðani kom alment fram, at kassin hjá Postverkinum er púra tómur, og at virksemið hjá stovninum steðgar innan tríggjar mánaðir, fær Postverkið ikki hjálp frá almenna myndugleikanum.

Lansstýrismaðurin í vinnumálum, Finnbogi Arge, gjørdi tá greitt, at hann ikki ætlar sær at biðja tingið um eykajáttan, fyrr enn hann er vísur í, at bygnaðurin fyri stovnin verður broyttur, so Postverkið gerst alment partafelag. Hesum var Tjóðveldisflokkurin harðliga ímóti og vísti í staðin á eina millumloysn, ið innibar at gera Postverkið til sjálvstøðuga almenna fyritøku, eins og Post Danmark.

### Gjørdist Post Danmark loysnin

Tjóðveldisflokkurin fekk sín vilja, tí nýggi bygnaðurin hjá Postverki Føroya kemur at verða snikkaður til eftir tí hjá Post Danmark. Men orsøkin til, at Finnbogi Arge hevur tikið undir við hesi loysnini er, at Postverkið fyribils bert skal hava hendan bygnað í trý ár.

Hesi trý árini skal ein nevnd hava evstu ábyrgdina av Postvekið Føroya, eins og vanligt er fyri partafeløg. Men tá tey trý árini eru liðin, skal nevndin avgera endaliga bygnaðin hjá Postverkinum. Og Finnbogi Arge hevur góðar vónir um, at nevndin tá fer at gera av, at Postverkið skal umskipast til partafelag.

Tað er tó ikki nóg mikið at hava funnið eina loysn á spurninginum um bygnaðin hjá Postverkinum. Neyðugt var eisini finna semju um, hvussu akutti peningatørvurin hjá Postvekinum skal loysast. Tí fer løgmaður í næstum at kalla tingið saman at viðgera eina umbøn frá Finnboga Arge, landsstýrismanni í Vinnumálum, um geva Postverkinum eina eykajáttan á 10 milliónir krónur.

At fáa hesa játtan roknar Finnbogi Arge ikki við fer at verða nakar trupulleiki, tí tingmenn vita av, at fær Postverkið ikki peningin, steðgar virksemið upp.

### Skera burtur dupultfunktiónirnar

Sambært Finnboga Arge er landsstýrið samt um, at tað eru alt ov nógvar dupultfunktiónir í almenna flutningskervinum í Føroyum. Strandferðslan og Postverkið røkja í mongum førum somu uppgávur.

Tí skal nú arbeiðast fram ímóti at samansjóða hesar uppgávur. Til at gera hetta verður settur ein arbeiðsbólkur mannaður við fólki frá Strandferðsluni, Postverkinum og Vinnumálastýrinum.

Eftir ætlan skal arbeiðið ganga so mikið skjótt fyri seg, at farast kann undir eina politiska viðger av hesum longu í heyst.

Finnbogi Arge sær møguleika fyri, at Strandferðslan og Postverkið gera eitt partafelag, ið skal røkja farma og postflutning kring oyggjarnar. Tí er eisini í nýggja bygnaðinum fyri Postverkið eisini syrgt fyri at geva Postverkinum heimild til at stovna partafelag við síðuna av almenna postverkinum.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum heldur ikki, at neyugt verður við fleiri uppsagnum, um Strandferðslan og Postverkið leggja saman partar av virkseminum. Hann vísir á, nýggja partafelagið kann skapa fleiri vinnumøguleikar og tískil eisini varðveita arbeiðsplássini.



*Postflutningurin skal rationaliserast og tí verður arbeitt við at leggja saman partar av virkseminum hjá Strandferðsluni og Postverkinum*

# Berg-hestar byggja ríðihøll

*Gongst sum ætlað, flyta Berg-hestar inn í stásiliga ríðihøll seint í heyst. Hetta fer at betra munandi um umstøðurnar hjá brekaðum at ríða*

John Johannessen

Byrjað er at grava út, og gongst arbeiðið sum ætlað, verður fyrsta føroyska ríðihøllin reist um ikki so langa tíð.

Ríðihøllin hevur nógvar fyrimunir við sær. Umframt, at umstøðurnar hjá limunum í Berg-hesum vera munandi betur, fáa eisini tey mongu brekaðu, ið regluliga ríða fyri at fáa heilsubót, nógv betri umstøður.

Í ríðihøllini vera lyftir, soleiðis, at tey, sum sita í koyristóli sleppa upp á hestbak uttan nakað hóvasták. Hetta heldur Leif Berg, dagligur leiðari, fer at økja munandi um áhugan og møguleikarnar hjá brekaðum fyri at ríða.

Eisini vísir felagið á, at ríðihøllin fer at gera umstøðurnar hjá teimum mongu ferðafólkunum, ið bæði vetur og summar ríða við Berg-hestum, munandi betur.

Umframt ríðihøll skal fjós eisini vera í bygninginium. Fjósið skal hýsa øllum hestunum hjá felagnum.

### Fáa tvær hallir

Fyri tveimum mánaðum síðani bórust tíðindini um, at Føroyskt íslandsrossafelag hevur fingið játtað eina millión krónur í stuðuli frá Tórshavnar býráð at byggja ríðihøll og felagshøli í Havnadali. Hetta merkir, at tað um ikki so langa tíð vera tvær ríðihallir í høvuðsstaðarøkinum.

Berg-hestar hava eisini fyri nøkrum árum síðani søkt um stuðul til sína ríðihøll. Men býráðið játtaði ikki umsóknini. Grundgevingin var, at Berg-hestar reka handilsvinnu. Føroyskt íslandsrossafelag er harafturímóti eitt áhugafelag, ið virkar fyri at stimbra áhuga fyri íslandsrossum í Føroyum, og tí kann felagið fáa stuðul.

Kortini er Berg-hestar einasta felagið í Føroyum - burtursæð frá onkrum einstaklingi í Norðoyggjum - ið bjóðar ríðing fyri brekað. Tí fekk felagið viðmælli frá MBF, tá tað søkti um stuðul, men hetta hjálpti einki.

### Mugu byggja kortini

Hóast Berg-hestar ikki fekk stuðul til sína ríðihøll, er kortini neyðugt hjá felagnum at byggja hana. Felagið heldur í løtuni til við Marknagilsvegin á einum øki hjá býráðnum. Men áðrenn juni næsta ár skal felagið vera burtur av hesum øki, tí tað skal nýtast til annað endamál.



*Leif Berg, dagligur leiðari í Berghesum, er sjálvur farin at grava út fyri nýggju ríðihøllini*
**Mynd: Jens Kristian Vang**







# Starvsfólk til Kaupthing Føroyar

**Hin 1. mars 2000 varð Kaupthing formliga virkið í Føroyum. Síðan hava Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar. Kaupthing Føroyar bjóðar fram tænastur innan handil og ráðgeving á virðisbrævamarknaðunum. Ætlanin er eisini at luttaka í uppbyggingini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði og við tíðini luttaka í eini væntaðari privatiseringstilgongd í Føroyum.**

### Byggja upp nýggja vinnu

Sum starvsfólk í Kaupthing Føroyar hevur tú møguleikan fyri at verða við til at byggja upp eina nýggja vinnu í Føroyum. Vit luttaka hvønn dag á altjóða fíggjarmarknaðunum innan handil og ráðgeving á lánsbræva- og partabrævamarknaðunum. Okkara kundar eru føroyskir stovnar, virkir og privatfólk.

Áhugin fyri hesum virksemi hevur síðan byrjanina verið sera stórur, og Kaupthing Føroyar er longu nú størsti útbjóðarin av hesum tænastum í Føroyum. Hetta merkir samstundis eisini, at okkum skjótast gjørligt tørvar fleiri fólk.

### Virðisbrævahandlari/ognarrøkil

Áhugin at handla virðisbrøv í Føroyum er so stórur, at vit hava brúk fyri einum fólki til:

- Ráðgeving og handil av virðisbrøvum fyri privatar og vinnuligar kundar
- Uppsøkjandi sølu mótvegis størri kundum
- Røkt av verandi avtalum við kundar

Førleikakrøv

Tú skalt helst hava eina hægri búskaparliga útbúgving og hartil starvsroyndir innan virðisbrævaøki, men tað hevur størst týdning, at tú hevur:

- Royndir við kundarøkt
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

### Umsitingarleiðari

Virksemi okkara er vorðið so umfatandi, at neyðugt er við einum ábyrgdarfólki at hava ábyrgdina av:

- Fíggjarstýring og roknskapi felagsins
- Uppbygging og viðlíkahaldi av mannagongdum
- Backoffice — t.e. avgreiðslu av virðisbrævahandlum
- Stýring av gjaldføri
- Felags við stjóran at hava ábyrgdina av umsiting felagsins annars

Førleikakrøv

Umsitingarleiðarin skal hava eina hóskandi útbúgving og hartil starvsroyndir, men tað hevur størst týdning, at tú hevur:

- Evnir at samskipa og raðfesta arbeiði
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

### Fólk til umsitingina

Saman við umsitingarleiðaranum verða dagligu ábyrgdarøki tíni:

- Backoffice — t.e. avgreiðsla av virðisbrævahandlum
- Avgreiðsla av posti og telefon
- Stýring av gjaldføri
- Fyrisiting av bókhaldi felagsins

Førleikakrøv

- Skrivstovuútbúgving ella líknandi
- Verða vanur KT-nýtari
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

Øll størvini verða sett skjótast gjørligt. Fyri størvini verður lønin ásett eftir avtalu. Umsókn við prógvum, CV og hartilhoyrandi skjølum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 27. mai 2000. Umsóknirnar, sum verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

Kaupthing Føroyar
Postboks 3090
110 Tórshan
ella á e-mail: peter@kaupthing.com

Nærri upplýsingar fáast um størvini við at venda sær til Peter Holm á telefon 351500.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR
Postboks 3090 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com